Heiðafuglur í Skúvoy 2010

Bergur Olsen, Havstovan

Summarið 2010 skipaði Fuglakanningarstøðin og Fuglafrøðifelagið fyri eini teljing av heiðafuglinum í Skúvoy, har 13 sjálvboðin fólk luttóku. Teljingin varð stuðlað av Innlendismálaráðnum.



Heiðafuglur í Skúvoy 2010

Bergur Olsen, Havstovan. 22.02.2011

Seinasta summar varð heiðafuglurin í Skúvoy taldur. 12 sjálvboðin fólk tóku lut í teljingini, sum var samskipað av Fuglakanningarstøðini og Fuglafrøðifelagnum.

Higartil hevur Fuglakanningarstøðin bert kannað sjófuglin, sum byggir í bjørgunum, men ein partur av sjófuglinum, t.d. skúgvur, kjógvi, fiskimási og likka byggja reiður inni á oynni. Hesin fuglur er sera lítið kannaður, og tí varð søkt um pening frá Innlendismálaráðnum til at telja hendan fuglin saman við øðrum heiðafugli.

Ætlanin var, at fáa fýra fólk at telja heiðafuglin fyri løn í tvær vikur, men tað rakk játtanin tíverri ikki til. Tí varð ein roynd gjørd at fáa fólk at telja innlandsfuglin uttan løn. Treytin var, at tey skuldu fáa allar útreiðslur afturrindaðar; ferðing, innivist og mat. Teljast skuldi í tvey vikuskifti við 6 fólkum hvørja ferð. ”Tilboðið” varð fyrst sent til limirnar í Fuglafrøðifelagnum, har tað eydnaðist at fáa 10 fólk. Seinni eydnaðist at fáa tvey fólk afturat, sum ikki vóru í Fuglafrøðifelagnum.

Framferð

Teljingarnar fóru fram vikuskiftini 18.- 20. juni og 25.- 27. juni. Ein stutt leiðbeining, sum sæst niðanfyri, varð skrivað um, hvussu farast skuldi fram. Hendan leiðbeiningin byggir á teljingarháttin, sum varð nýttur við seinastu teljing í 2001. Tá vórðu fuglapørini prikkað við ymiskum liti inn á kort, so ein sær hvar tey vóru. Kopi av hesum kortum vórðu gjørd til teljingina, sum teljararnir høvdu við út í hagan saman við nýggjum kortum. Ein prikkur, við ávísum liti fyri hvørt fuglaslag, varð so settur í kortið, so hvørt eitt par varð sætt. Einsamallir fuglar, sum ikki høvdu reiður, vórðu eisini skásettir í summum førum.

Leiðbeining til teljing av innlandsfugli í Skúvoy 2010

Teljingarøki

Tað eru 5 hagapartar, sum eru býttir upp við hegni, sum gongur tvørtur um alla oynna, og innangarðs er eisini hegnað fyri seg. Hesi 6 økini verða tald fyri seg, og best er, um tvey fólk telja hvørt øki.

Leiðir har teljararnir skulu ganga

Gingið verður ímillum hegnini nøkulunda eftir hæddarkurvunum á kortinum. Frástøðan ímillum hvørja leið kann vera 100 til 300 m, alt eftir hvussu tættir fuglarnir eru, og hvussu útsýnið er. Um tvey ganga saman, ber til at taka tvær leiðir samstundis.

Teljingarháttur

Tel allar fuglarnar, sum síggjast á leiðini. Skráset teir á kortið, sum síggja út til at vera pør. Nýt somu litir, sum í innsetta kortinum frá 2001.

Tú skalt ikki leita eftir reiðrum í langa tíð, men um tú kemur fram á reiður, tel so egg og ungar.

Teir flestu fuglarnir kunnu teljast, meðan tú gongur við vanligari ferð ígjøgnum økið og skrivar upp so hvørt. Hesir eru t.d. tjaldur, spógvi, lógv, grátítlingur, summargrátítlingur, músabróðir og steinstólpa.

Fuglar, sum byggja saman í bølum, eru lættastir at skráseta, um tú sært inn yvir økið uttan at órógva teir. T.d. um tú situr uppi á einum heyggi við einum góðum kikara ella teleskopi. Hesin háttur kann t.d. brúkast til skúgv, kjógva, likku, fiskimása og ternu.

Mýrisnípa**.** Skráset steggjar, sum flúgva paringarflúgving.

*Æ*ður. Skráset æðureiður og æður við ungum. Tel eisini egg og ungar hjá hvørjum pari.

Starar. Skráset reiður og tel stararnar.

Gráspurvur. Skráset gamlar steggjar og tel gráspurvarnar.

Úrslit

Úrslitini eru skrivað inn á fýra kort (Mynd 1 – 4). Kortini eru talgild og viðgjørd í ArcMap forritinum, so til ber at knýta aðrar upplýsingar til hvørt reiðurplássið, t.d. positiónina, hæddina har tey eru skrásett, plantuvøksturin á staðnum og annað.



Mynd 1. Skúgvar og kjógvar. Teir bláu prikkarnir eru skúgvapør, og teir reyðu eru kjógvapør. Sirklarnir eru fuglar, sum ikki reiðrast.

Mynd 2. Tjøldur og spógvar. Teir bláu prikkarnir eru tjøldurspør, og teir reyðu eru spógvapør. Sirklarnir eru fuglar, sum ikki reiðrast.

Mynd 3. Láir og mýrisnípur. Teir bláu prikkarnir eru láarpør, og teir reyðu eru mýrisnípupør.

Mynd 4. Fiskimásar, likkur og svartbakar. Teir bláu prikkarnir eru fiskimásapør, teir reyðu eru likkupør, og teir grønu eru svartbakapør.

Umrøða

Fuglurin í Skúgvi er taldur tríggjar ferðir undan hesari teljingini við 20 árum ímillum hvørja teljing. Fyrstu ferð var í 1961, tá ið Anders Holm Joensen kannaði fuglin í Skúvoynni (Joensen 1963), og tjúgu ár seinri varð skipað fyri eini teljing av øllum fuglinum í Føroyum uttan bjargafuglinum (Bloch 1981), og í 2001 skrivaði Ivan Olsen serritgerð um fuglin í Skúvoynni (Olsen 2001). Hesi úrslit eru samanborin við teljingina í 2010 í talvu 1. Sum sæst, er ein minking farin fram í flestu førum, men eitt týðiligt undantak er tann stóri vøksturin í skúgvastovninum.

Talva 1. Fuglateljingar í Skúvoynni. 1961 (Joensen 1963), 1981 (Bloch 1981), 2001 (Olsen 2002) og 2010.

Ár	1961	1981	2001	2010
Æða		35	24	2
Tjaldur	34	115	92	78
Lógv	33	41	58	21
Grágrælingur	5	3	4	1
Fjallmurra		1	8	0
Mýrisnípa	70	37	75	41
Spógvi	41	41	35	12
Kjógvi	290	102	128	55
Skúgvur	43	23	65	145
Skatumási	0	1	2	0
Likka	20	9	18	4
Fiskimási	75	7	12	16
Svartbakur	15	3	8	5
Terna	25	312	0	0
Bláðúgva	20	3	10	7
Títlingur		7	1	5
Grátítlingur		51	117	88
Músabróðir		6	17	2
Steinstólpa		42	82	62
Kvørkveggja	0	0	2	0
Kráka		4	3	0
Ravnur	4	2	2	2
Stari		>200	275	>200
Gráspurvur	13	>10	25	0



Mynd 5. Tann lutfallsliga broytingin í sjófuglinum í mun til 1961. Ein stór minking hevur verið í øllum stovnunum frá 1961 til 1981, men síðani hava teir verið meira støðugir burtursæð frá einum stórum vøkstri í skúgvastovninum.



Mynd 6. Tann lutfallsliga broytingin í vaðfuglinum í mun til 1961. Talið av tjøldrum er vaksið nógv ímillum 1961 og 1981, men síðani er tað minkað nakað aftur. Talið av spógvapørum er minkað nógv seinastu 10 árini.



Mynd 6. Tann lutfallsliga broytingin í smáfuglinum í mun til 1981. Talið av grátítlingi og steinstólpu vaks ímillum 1981 og 2001, men er minkað eitt sindur aftur seinastu 10 árini.

Ein partur av heiðafuglinum er sjófuglur; kjógvar, skúgvar, likkur og másar, og teir eru tengdir at hvussu nógv føði er í sjónum. Hin heiðafuglurin, sum mest livir av maðkum og skordýrum, nýtist ikki at sveiggja í tali, sum sjófuglurin. Men har er kanska eitt ávíst samband kortini, tí veðurlagið hevur stóra ávirkan á plantur og djór bæði á landi og sjógvi.

Hóast vit ikki hava tøl fyri heiðafuglin, so tykist tað, at hann eisini var nógvur, samstundis, sum sjófuglurin var upp á sítt besta í seinastu øld; í 1940 og 1950 árunum. Hesi seinastu árini hava eisini verið sera vánalig fyri bæði sjófugl og heiðafugl, og tí er ikki óhugsandi, at broytingar í veðurlagnum, sum eru vánaligar fyri sjófugl, eisini fyri ein part eru vánaligar fyri heiðafuglin; bæði tann sum finnur sær føði á sjónum og tann, sum finnur sína føði á landi. Fyri betur at skilja hetta, er neyðugt við teljingum, sum vísa gongdina ár um ár.

Tøkk
Allir teljararnir verða takkaðir fyri arbeiðið. Teir vóru: Andrea Midjord, Sólveig Sørensen, Bergur Olsen (Norðarihagi, Norðaripartur), Dinna Poulsen, Kristin Poulsen (Norðarihagi, Heimaripartur), Maria Róin, Ditlev Róin (Miðjan), Svenn Justinussen, William Simonsen (Uttarihagi, Heimaripartur), Jákup Durhuus, Silas Olofson (Bergið), Diana Thomsen og Petur Thomsen (Innangarðs). Teljingin varð stuðlað av Innlendismálaráðnum.

Bókmentir.

Bloch, D. 1981. Fugletælling på Færøerne sommeren 1981 - foreløbig rapport – Dansk orn. Foren. Tidsskr. 75: 1-6.

Højgaard, D.P. 1995. Fuglakanningar í Skúvoy. Føroya fuglafrøðifelag 9: 25-27.

Joensen, A.H. 1963. Ynglefuglene på Skúvoy, Færøerne, deres udbredelse og antal. Dans, orn. Foren. Tidsskr. 57: 1-19.

Olsen, I. 2002. Optælling af fuglene på Skúvoy. Antal, bestandsudvikling og habitatvalg af ynglefugle på en færøsk ø. Specialerapport, Københavns Universitet. 108 s.